TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Byggi- og umhvørvisdeildin**
**Fyribils nýtsluloyvi**

Dagfesting
22. august 2018

Okkara j.nr.
14/00941-335

Málsviðgeri
Óli á Grindafløtti

Tygara j.nr.

Landsverk
Tinghúsvegur 5
110 Tórshavn

**FYRIBILS NÝTSLULOYVI**

**Viðvíkjandi skúladeplinum GLASIR á ognini matr. nr. 1173a, Tórshavn**
Gøtunavn og nr.: Janusargøta 3
Eigari: Tekniski skúlin

Byggieftirlitið hevur tann 6. og 15. august 2018 sýnað omanfyri nevndu bygging og staðfest, at byggingin ikki er liðug.

Hóast byggingin ikki er liðug metir byggivaldið, at tað er einki til hindurs fyri, at geva fyribils loyvi til, at byggingin verður tikin í nýtslu, vísandi til Bygningskunngerð 2017, kap. 1.6, stk. 2., har tað er ásett:

> *Kommunali byggimyndugleikin kann í ávísum førum, sbrt. § 17, stk. 3 í byggilógini, geva fyribils loyvi til, at bygging kann verða tikin í nýtslu, heilt ella lutvíst, hóast byggingin enn ikki er heilt liðug.*
> *Kommunali byggimyndugleikin kann seta eina freist fyri, nær byggingin skal vera liðug.*
> *Somuleiðis kann kommunali byggimyndugleikin krevja fíggjarliga trygd fyri, at arbeiðið verður gjørt liðugt. Um freistin ikki verður hildin, kann kommunali byggimyndugleikin skipa fyri, at byggingin verður gjørd liðug fyri veittu trygdina.*

Fyribils loyvi er treytað av:

- at skúlin einans verður nýttur til vanliga undirvísing og ikki samkomur, veitslur og onnur tiltøk.
- at øll viðurskifti, sum eru lýst í viðløgdu fylgiskjølum, skulu verða fingin upp á pláss innan 3 vikur, galdandi frá dagfestingini á hesum skrivi.

Áðrenn endaligt nýtsluloyvi verður givið, skal bygningurin sýnast aftur. Nýtt sýn verður fríggjadagin 14. september 2018, kl. 10:00.

Tað verður gjørt vart við, at ein fingin nýtsluváttan forðar ikki byggivaldinum í at krevja rætting av ósamsvaran, sum kemur í ljósmála seinni.

Avrit er sent Brennistøðini í sambandi við ruskinnsavnan og rottangatøming.

Viðlagt:

Fylgiskjal 1 – Brunaflatmyndir við viðmerkingum, hædd 01 - 06
Fylgiskjal 2 – Viðmerkingar í mun til brunatrygd
Fylgiskjal 3 – Viðmerkingar í mun til atkomu v.m.
Fylgiskjal 4 – Notat viðv. rakstrar- og viðlíkhaldsætlan

Vinaliga
k.v.

Óli á Grindafløtti
virkandi deildarleiðari